# Kappingin millum USA og Europa, Hvar liggja smálond sum Danmark?

## *og hvar liggja Føroyar?*

**Spurningurin er í stuttum: *Hvussu ber tað til at framleiðslan (bæði av vørum og tænastum) veksur skjótari í USA enn í Europa?* Londonblaðið The Economist viðger í seinasta nummarið ein spurning, sum búskaparfrøðingar hava havt ilt við at svara uppá higartil. Teoriirnar, sum eru vanligar á flestøllum universitetum, kunnu ikki brúkast, og politikkmakarar hava tí eingi amboð**

**BÚSKAPARTEORI, TEY FREMSTU OG NÆSTFREMSTU**

*Rolf Guttesen*
rg@geogr.ku.dk




**Framvegis stórt hall á amerikanska handilsjavnanum**
*Vikan hevur ikki givið stórvegis broytingar í veksli-lutfallinum millum Dollar og Euro. Tó fór talið fríggjadagin í seinastu viku fyri fyrstu ferð niður um 1,17 og endaði tann dagin á 1,1697. Inflatiónin í USA heldur fram, og nýggj tøl koma mikudagin. Oljuprísirnir hava generelt verið hækkandi, og hetta væntast at síggjast aftur í einum almennum prísvøkstri. Men ofta hevur tað víst seg, at tøl, sum vera hildin at vera skaðilig ella negativ, ikki hava nakra serliga ávirkan á Dollaran í løtuni. Eitt nú var handilsjavnin hjá USA negativur í september, størri hall enn væntað, men hetta trýsti ikki Dollarkursin.*

Blaðgreinin er ein kritisk viðger av vísindaligari



grein, á eingilskum kallað Appropriate Growth Policy ( á føroyskum kanska: nýtiligur vakstrarpolitikkur) skrivað av tveimum amerikanskum økonomum, Philippe Aghion og Peter Howitt. Tað, sum eg skrivi í hesi grein, er bert ein roynd at endurgeva høvuðsinnihaldi og perspektivini, soleiðis sum The Economist refererar tað. Haraftrat kanska binda eitt umfar aftrat um Føroyar sum eitt "aparte" land.

Eg hugsaði eisini, at hetta lítla íkastið kundi verið gangligt í orðaskiftinum um Landsstýrisins "Visión 2015", sum hevur sum endamál at gera *"Føroyar í 2015 verða millum bestu lond at virka og liva í"*

**Hvat siga tær vanligu teoriirnar?**

Tær vanligu teoriirnar um búskapraligan vøkstur kunnu brúkast til at forklára hví rík lond eru rík, og hví fátæk lond eru fátæk. Men teoriirnar hava lítið ella einki at siga um , hví summi rík lond, sum til dømis USA, hava skjótari ella størri vøkstur enn onnur rík lond, sum til dømis mesta av Europa. Teoriirnar siga heldur einki munagott um, hvat ið hesir eftirbátar skula gera fyri at seta ferðina upp, og kanska kunna taka oddafiskarnar aftur.

Greinin sigur, at í høvuðsheitum eru tríggir bólkar av teorium, sum leggja dentin ymsastaðni.

- **Kapital-akkumulatión**. Ein leggur dent á, at kapital-akkumulatión (akkumulatión: upphóping, samansavning) er fortreyt fyri vøkstur í framleiðslu. Henda læran kann kanska forklára, hví eysturasiatisku londini fóru fram um suðuramerikansku londini í vøkstri í seinnu helvt av farnu øld (1900-talinum). Men teoriin kann ikki forklára hví Europa er komið at liggja aftanfyri USA, sum at kalla onga uppsparing hevur.
- Góðar institutiónir. Onnur leggur dent á, at landið skal hava góðar og vælvirkandi samfelagsligar institutiónir ella stovnar í breiðari merking. Eitt vælsmurt og trimmað umsitingartól, sum ikki er korrupt, og har mannagongdirnar eru klárar og einfaldar. Henda teori kann í mongum føri forklára gloppið ella gjónna millum rík og fátæk lond. Men ikki hví tað er munur millum tey hampuliga ríku londini sínámillum.
- Innovatiónir
Ein triðja teori leggur áherðslu á , at innovatión er kraftin, sum setir ferð á framleiðsluna. Høvundarnir at nýggju greinini, Aghion og Howitt, siga, at henda teori higartil ikki hevur kunnað forklárað, hvussu eftirbátar kunnu taka teir fremru aftur. Dømið er Europa, sum í eini 30 ár aftaná Annað Heimskríggj hevði nógv skjótari vøkstur enn USA, men so kom ein tíð har vakstrarlagið stóð á jønnum, og seinast hevur USA so lagt Europa afturum í so máta.

**Tey fremstu og tey næstfremstu**

Í ritgerðini hjá Aghion og Howitt er teknologisk framgongd á einum týðandi plássi. Tankagongdin er í hesum føri rættiliga einføld Teir siga, at í einum givnum landi kann vinnulívið antin brúka bestu teknologiina sum fæst, ella hon kann brúka nakað, sum ikki er tað mest framkomna. Her er tað, at teir fara at skilja ímillum, eisini hvat vinnulívspolitikki viðvíkur.

- Tey mest framkomnu londini, ella sum teir siga – tey sum liggja á "the cutting edge" – hava fyri neyðini at brúka innovatión, sum motor til búskaparligan framgongd.
- Tey, sum ikki eru við í sjálvum oddabólkinum, men liggja í kjalarvørrinum, kunnu skapa framgongd og vøkst við at taka upp framleiðsluhættir, sum kanska ikki eru tær mest teknologiskt avanceraðu í verðini, men sum tó eru betri og effektivari enn tað, sum higartil hevur verið brúkt í framleiðsluni.

Henda einfalda niðurstøða kann sigast at avmynda veruleikan rættiliga væl. Tað er ein munur innanhýsis millum lond í tí bólkinum, ið verða mett at vera rík, vælstandandi og í góðari framgongs.

**Høvundarnir avleiða so tvær konklusiónir**

***Konklusión A***: Tað er munur á teimum, sum liggja allarfremst, og teimum sum koma beint aftaná. Og hetta er avgerandu fyri, hvør vinnupolitikkur skal førast. So, ikki er vist, at londini í jagstrandi bólkinum, skulu brúka sínar kreftir uppá

sama máta sum oddaliðið. Tað er munur á hvat skal til, um oddaplássi skal haldast og konsoliderast, ella um jagstrandi liðið í næsta bólkinum skal kunna fylgja við, og kanska hava møguleika at taka oddaliðið aftur.

Í hesum sambandi hevur útbúgving avgerandi týdning. Í londum, sum liggja nær ”the cutting edge” er framgongdin nær knýtt at einum super-høgum útbúgvingarstøði. Men í næsta bólkinum, í jagstrandi bólkinum, hevur útbúgving eisini týdning, men her er tað eitt annað slag av útbúgving, sum krevst. Universitetsútbúgvingar hava her ikki avgerandi týdning, men grundskúlin og miðnámsskúlin hava lutfallsliga meiri at siga.

### Høvundarnir lýsa hetta við nøkrum dømum.

- USA brúkar umleið 3% av framleiðsluni (GDP) til hægri útbúgving. ES brúkar bert 1,4%.
- Meira enn ein triðingur av amerikanarum hava eina hægri útbúgving, í ES er hetta minni enn fjórðingur.

Men europeisku londini hava so eina betri útbygda miðnámsútbúgving (secondary school) enn USA. Hetta taka høvundarnir, Aghion og Howitt, sum ábending um, hvussu tað bar til hjá Europa at koma fyri seg aftaná kríggið, fáa skjótan vøkstur í langar periodur. Men ongantíð komu europeisku londini fram um USA á tí teknologiska økinum.

***Konklusión B:*** Flestu teoriir viðgera spurningin um kapital-akkumulatión, men ongar ella fáar viðgera fyribrigdi kapital-oyðilegging. Hetta er tó einki nýtt fyribrigdi, tí longu Marx skrivaði um ”Entwertung des Kapitals” fyri 150 árum síðani.

Spurningurin snýr seg um, hvussu læt tað er hjá nýggjum framleiðarum og ídnaðargreinum at koma fram at og inn á marknaðin. Hetta kann antin henda á tann hátt, at gamlir leikarar vera útspældir og heilt nýggir sleppa framat. Ella tað kann eisini ske á tann hátt at gomlu spælararnir fáa sær ein hvøkk at teim nýggju, sum troðka seg fram; teir fáa sær modernaði framleiðslutól og vinna kampin á tann hátt. Her eigur hugtakið, sum er sera væl kent í føroyskum politikki, stuðulspolitikkur at koma inn. Ger slíkur poilitikkur í longdini meria skaða enn gagn?

### Hvar liggja Føroyar?

Hetta, sum í stuttum er framlagt omanfyri, kann ikki beinleiðis brúkast uppá føroysk viðurskifti. Føroyar liggja á ongan hátt ella uppá nakran máta á ”the cutting edge,” hvørki teknologiskt ella í gransking ella útbúgving. Og koma heldur ongantíð at liggja har!

Men tað er áhugavert, at leiðandi búskaparfrøðingar skifta orð um munin millum tey fremstu og næstfremstu stóru búskaparøkini í heiminum, millum USA og ES. Tað kundi givið møguleika til umhugsan av støðuni hjá smáum, men lutfalsliga ríkum londum, sum liggja á fjórða, fimta ella sætta plássi í búskaparligum høpi.

Í donskum strategi-ætlanum um framtíðina (hvørjum skulu vit liva av um 10 ár?) havi eg sæð fleiri ferðir, at Danmark skal taka støði í tí veruleika, sum ikki slepst undan, at landið er pinkalítið – og tí ”aparte” (víkir frá). Í Danmark búgva umleið 1% av íbúgvunum í ES. Tí skulu strategiirnar viðvíkjansi vøkstri, satsing, gransking og útbúgving byggja á at landið er ”aparte,” lítið og fyllir bert eina nisju.

Er Danmark lítið og ”aparte” so er Føroyar upp aftur minni og enn meira aparte. Spurningurin er um nakrar búskaparligar teoriir yvirhøvur kunnu brúkast í Føroyum? Eg nevni hetta, tí ofta havi eg varhugan av, at politikkur á hesum øki, ofta bert er herming og avskriving, uttan atlit til at landið er burturav aparte. Ofta kennist tankagongdin aftur, sum liggur í kendu orðunum hjá konginum av Sachsen, tá hann sá ein jarnbreytartunnil í Einglandi: ”So ein Ding müssen wir auch haben”

”*Minst helvtin av okkara ungdómi skal hava hægri útbúgving*” segði Løgmaður í Ólavsøkufrá-greiðingini í ár. *”3% av BTÚ skal brúkast til gransking og menning”*. Tað ljóðar gott, menn eingin hevur enn undirbygt, umm hetta er skilagott.

Kanska skulu Føroyar, ”aparte” sum tær eru, ganga heilt aðrar leiðir?

…

*Keldur:*

The Economist**: Economic focus: Closing the gap**. Oct. 29th 2005, p 86

Aghion & Howitt: **Appropriate growth Policy, A unifying framework**. <post.economics.harvard.edu/faculty/aghion/papers/appropriate_growth.pdf>

Løgmaður**: Frágreiðing Løgmans á Ólavsøku 2005**. Føroya Landsstýri

# APT skattur og útbúgvingar

VINNUSÍÐU-KRONIKKIN
*Ben Arabo*



**(Vit prenta her sjónarmiðið hjá Ben Arabo, sum varð varpað út í ÚF í seinasta vinnutátti)**

Flestu føroyingar nema sær í dag útbúgving í Danmark. Nøkur eru í øðrum Norðurlondum og so fer ein lítil prosentpartur aðrastaðnis at lesa. Hetta er óheppið fyri Føroyar. Ikki tí. Skandinaviskar utbúgvingar eru ivaleyst líka góðar sum útbúgvingar aðrastaðnis, men tað handlar ikki bara um lærdómin. Tá 9 útav 10 føroyingum, sum fara at lesa, fara til Danmarkar, so fylgir eitt danskt netverk og ein danskur máti at hugsa uppá við og ikki minst ein donsk uppfatan av hvussu ting skulu umsitast. Hetta er ikki ein kritikkur av hesum, men tað er umráðandi at vit eisini fáa netverk og íblástur úr øðrum londum.

Føroyar eru so lítlar, at vit mugu tilpassa okkum til heimin, tí at eitt er vist, og tað er, at heimurin tilpassar seg ikki til okkum.

Tað er umráðandi, at vit fáa okkara unga fólk út í onnur lond at lesa, útyvir Danmark og Skandinavia. Hetta merkir ikki, at eingin skal fara til Danmarkar og Norðurlond í framtíðini, har er eitt gott søguligt samband og ikki hevði tað verið gott, um vit einki útbúgvingarligt tilknýti høvdu til okkara norðulendsku grannar.

Hví fara ffleiri ikki út í heim í dag? Ein meinbogi kann verða, at man hevur favoriserað danskar útbúgvingar í nógv ár. Til dømis finnast sáttmálar við tað almenna, har normerað tíð hevur ávirkan á løn. Hvat er hetta fyri fjas? Hetta favoriserar lond við teimum minst intensivu lesiplanunum. Lat okkum koma burtur frá hesum, og síðustilla ein kandidat frá Roskilde ella Keypmannahavn við ein frá Oxford, Milano, Sorbonne ella Seattle. Gera vit ikki tað, so kunnu vit gloyma alt tos um at gerast meiri international í Føroyum.

At verða eitt lítið land verður ofta framført sum ein vansi, men tá tað kemur til almenna umsiting og hvussu vinnan fær karmar at virka undir, so er tað ein stórur fyrimunur. Trupulleikin er bert tann, at vit kopiera danska lóggávu so at siga kritikkleyst, uttan at hyggja eftir, um frakkin ikki er for stórur. Donsk lóggáva og donsk umsiting riggar ivaleyst frálíkt í Danmark og kunnu vit sikkurt læra nógv gott higani, men Føroyar eru ikki Danmark, og føroysk vinna er ikki donsk vinna, tí at skalain er ein heilt annar. Tá vit kopiera danska lóggávu og donsk umsitingarmodellir, so lóggeva vit okkum burtur úr øllum teimum fyrimunum, vit hava sum eitt lítið samfelag.

Vit hava for nógvar lógir og for torskildar lógir. Vit lóggeva sum eitt stórt samfelag við óavmarkaðari umsiting. Tað ber ikki til – hvørki samfelag ella vinna hevur ráð til tað. Vit eiga at foreinkla lógarverkið og uppfinna umsitingarskipanir, sum øll onnur lond øvunda okkum. Vit eiga at leiða og ikki elta.

Vit eiga sum mál at hava heisins mest effektivu skattaskipan, tí vit eru eitt av minstu londum við einum frálíkum elektroniskum infrastrukturi.

Um vit hyggja uttanfyri donsku og skandinavisku børgaðarnar eftir íblástri viðvíkjandi eina universalskattaskipan fyri øll - borgarar og vinnu - so kunnu vit til dømis hyggja at APT skattinum, sum amerikanski økonomiprofessarin Edgar L Feige úr University of Wisconsin í Madison, hevur skotið upp. APT stendur fyri Automated Payment Transaction. Skipanin gongur stutt og greitt út uppá, at betalari og móttakari av einari og hvørjari pengatransaktión automatiskt betala ein lítlan prosentpart í skatti – í USA roknar Feige við 0.3%, men viðgongur at hetta % eigur at verða hægri fyri europeisk lond við hægri almennum útreiðslum. Ein slík skipan vildi merkt, at óansæð um tað var løn, handilskeyp, keyp av rávøru, søla av liðugtvøru, útgjald av dividendu, keyp av partabrøvum, søla av einum banka o.s.fr. So skuldi hetta lága gjald automatiskt farið í skatti. Hetta er ein skattur av hvørjari transaktión og ikki av yvirskoti. Eingin sjálvuppgáva, eingin MVG uppgerð, so at siga eingin umsiting, tí skattinkrevjingin verður gjørd av einari maskinu í einum almennum kjallara. Utopi? Eg veit ikki, og problemið er, at tað ger heldur eingin annar, so leingi hetta ikki verður kannað. Riggar ein slík APT skattaskipan nakrastaðnis í verðini, so riggar hon í Føroyum.

